Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Annika Olsen, løgtingsmaður

Svarari: Jenis av Rana, landsstýrismaður í uttanríkis- og mentamálum

Evni: Starvfólkatrot og løn undir útbúgving

Spurningar:

1. Hvørjar ætlanir hevur landsstýrismaðurin í sambandi við starvfólkatrotið á eldraøkinum?
2. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at geva starvfólkum á eldraøkinum løn undir útbúgving?
3. Arbeiðir útbúgvingarráðið við nøkrum ítøkiligum uppskotum viðvíkjandi løn undir útbúgving til heilsuhjálparar?
4. Eru nakrar ætlanir um at stytta arbeiðsvikuna hjá starvfólkum, ið arbeiða í skiftandi vaktum?

Viðmerkingar:

Sambært Búskaparráðnum fara at mangla 700 starvfólk í tey næstu 10 árini t.e. á almanna- og heilsuøkinum, eldraøkinum og á dagstovnaøkinum. Ein rættiliga stórur partur av hesi avbjóðing liggur á eldraøkinum. Støðan hjá eitt nú heilsuhjálparunum er als ikki nøktandi. Høgtøl frá juni 2020 vísa, at miðalaldurin á heilsuhjálparum er 50 ár, og til samanberingar var hann 47 ár í februar í 2019. Viðvíkjandi faklærdum og ófaklærdum heilsuhjálparum er myndin tann sama, at tað er yvirvág av ófaklærdum heilsuhjálparum. Av teimum 224 heilsuhjálparunum, ið starvast í Suðurstreymi, eru heili 129 ófaklærd, meðan 95 eru faklærd. Til samanberingar kann nevnast, at í VEKS samstarvinum eru tað 36 faklærd og 16 ófaklærd og í Nánd samstarvinum eru tað 40 faklærd og 22 ófaklærd. Somu gongd síggja vit í tølunum á avloysarum , ið taka avloysaravaktir í Suðurstreymi, har ein yvirvág er ófaklærd. Her er talið 33, meðan tað er munandi færri ófaklærdir avloysarar í hinum eldrasamstørvunum. Somuleiðis vísa hagtøl, at av teimum íalt 549 heilsuhjálparunum, ið arbeiða meiri enn 59 tímar um mánaðin, eru tað 247 starvfólk, ið eru í aldrinum 41-60 ár.

Í Íslandi hevur mann stytt arbeiðsvikuna hjá starvfólkum, ið arbeiða í skiftandi vaktum. Í Íslandi er full arbeiðsvika nú 32 tímar. Hetta er gjørt sum ein liður í at bøta um viðurskiftini hjá hjá hesum starvsbólkum.

Gongdin í Føroyum er alt annað enn nøktandi, og tí er tað í tøkum tíma, at nakað munagott verður gjørt við starvfólkaavbjóðingarnar á eldraøkinum, og tí verða hesir spurningar settir landsstýrismanninum.

Á Løgtingi, 9. august 2021

Annika Olsen